# Undirhúsið í Gøtu letur nú upp alment

**Martin Juul Jarnskor, sum hevur verið primus-motorur fyri undirhúsinum, sigur, at nógv sjálvboðið arbeiði er gjørt og teir, sum standa aftanfyri tiltakið, hava eisini latið pening til fyri at náa undir land**



*- Nú eru vit so komnir undir land, og vit fegnast um tað verk, sum nú stendur liðugt, sigur Martin Juul Jarnskor*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

UNDIRHÚS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú fáa gøtumenn sítt undirhús.

Martin Juul Jarnskor, sum hevur verið ein av teimum ágrýtnastu at fáa undirhúsið undir land, sigur, at teir hava ásett dagin til almennu upplating til leygardagin komandi klokkan 13.

Tað er Gøtu kommuna, sum hevur latið ein part av gamla kai-húsinum til endamálið, og í hesum sambandi hevur kommunan innrættað hølini av nýggjum og sett tey í stand.

## Nógv sjálvboðið

Martin Juul sigur, at nógv sjálvboðið arbeiði er lagt í undirhúsið og teir, sum standa aftanfyri tiltakið, hava eisini latið pening til fyri at náa undir land.

- Vit hava mætt stórari vælvild, og eitt nú hava vit fingið tey trý vindeyguni, sum eru í hølunum, frá Alu-Plast. Aðrar fyritøkur hava eisini stuðlað okkum.

Hølini eru umvæld, innrættað av nýggjum og sett í stand til endamálið.

Martin sigur, at ein av teimum ágrýtnastu hevur verið Hargarð Tvørfoss, sum bæði hevur spartlað, tapetserað, málað og lagt á gólvið, umframt at hann hevur skorið til og neglt geriktir. Haraftrat hevur hann sett køkin, sum er í hølunum, upp.

- Hargarð hevur lagt eitt stórt arbeiði í hetta verk, sigur primus-motorurin, sum heldur, at hølini nú eru sera hugnalig til endamálið.

Martin Juul sigur, at tað, sum restar í, er wc og brúsa, sum teir eisini gjarna vilja hava.

## Eisini ferðandi

- Vit kundu hugsað okkum, at ferðafólk, sum koma higar til bygdina í bátum og annars detta fram við í Gøtu, kundu brúkt hølini um sumrarnar, soleiðis at hesi sleppa undan at krógva seg millum húsini at sleppa sær av við tað "náttúrliga". Eisini kundu hesi fingið eitt brúsubað og annars sitið í hølunum og hugnað sær aftur við einum kaffimunni.

Hann vísir á, at teir, sum standa aftanfyri undirhúsið, hava einki aldursmark sett á, hvør kann koma í hølini.

- Vit halda ikki, at hetta er neyðugt, tí teir yngru, sum kanska kundu hugsað sær at dottið framvið, kunnu saktans fáa nakað burtur úr at hoyra okkum eldru og gomlu tosa um tær royndir, sum vit hava gjørt okkum í lívinum.

Martin Juul sigur, at ætlanin er eisini at útvega sær eitt sjónvarp at stytta sær stundir við.

## Gott útsýni

Útsýnið úr undirhúsinum er gott.

- Vit hava niðaru síðu av bygninginum, og haðani sæst yvir á Syðrugøtu, nakað útyvir víkina, og somuleiðis kunnu vit fylgja við, tá ið bátar koma aftur at landi.

Hann sigur, at rúmið, sum teir hava í kai-húsinum, er einar 19 fermetrar stórt.

- Vit halda, at hetta er nóg mikið, tí tað skapar eisini sín hugna, at rúmið ikki er alt ov stórt.

Martin Juul vísir á, at teir eldru og gomlu ikki altíð hoyra so væl, og tá kann tað vera heppið, at menn sita tætt sama og skifta orð.

## Undir land

Tað eru eini tvey ár síðan, at einir 30 mans í Gøtu fóru til fundar at røða um at fáa eitt undirhús í bygdini.

- Nú eru vit so komnir undir land, og vit fegnast um tað verk, sum nú stendur liðugt, sigur hann.

Tá ið latið verður upp leygardagin, fer eitt skeltið at standa á húsinum.

- Á skeltinum fer at standa "Undirhús", men vit vilja ikki avdúka, hvussu húsið fer at verða rópt. Tað verður navnið á einum søguligum og kendum persóni, sigur ein fegin Martin Juul Jarnskor at enda.



*- Vit vilja syrgja fyri, at tað verður trygt at ferðast í Leirvíkar bygd, tá ið tunnilin letur upp. Tað er ein almer at skilagóðar loysnir verða funnar, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri*

# Leirvíkingar í eini

**- Ein loysn skal liggja á borðinum, áðrenn ferðslan úr Norðoyatunlinum sleppur ígjøgnum bygdina. Tað er ein treyt. Vit vilja tryggja okkara borgarar, bæði tey, sum ganga og tey, sum ferðast í bili, sigur borgarstjórin í Leirvík, Fríðgerð Heinesen**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leirvíkingar eru í eini ólukkuligari støðu, nú ferðslan úr Norðoyatunlinum nærkast í hvørjum, og eingin loysn á ferðsluviðurskiftunum gjøgnum Leirvíksbygd er í ljósmála.

Í øllum førum kunnu bæði kommunal-og landspolitikarar staðfesta, at eingin peningur er settur av til vega-ella tunnilsbygging í Leirvík, sum kann byrgja uppfyri, at nógva ferðslan, sum verður av hesi n‡ggju farleið, ikki verður til ampa fyri borgararnar í Leirvík.

Men tað verða ikki bara leirvíkingar, sum koma at kenna sviðan av hesi ferðslu. Eins og leirvíkingar fegnir vildu heilsað hesum frambroti í føroyska vegakervinum vælkomnum, tá ið tað gerst veruleiki um eitt hálvt ár ella so, kann væntast, at trupulleikar eisini verða við ferðsluni gjøgnum trongan við Gøtugjógv, har bæði skúli og barnagarður eru.

Ein annar fløskuhálsur verður vegurin gjøgnum bygdina, Skipanes, og tá verða tað serliga tey, sum búgva Undir Gøtueiði, sum fara at hava ilt við at sleppa oman á høvuðsvegin, tí omankoyringin longu sum er, má sigast at vera ein rættilig deyðsfella.

Vegurin oman frá ein parti av húsunum Undir Gøtueiði, er sum ein rutsji-breyt, og hann gongur beint oman í høvuðsvegin. Er kavi og hált, kanst tú skjótt enda úti á vegnum og beint í allari ferðsluni, sum koyrir fram við.

## Ikki semja

Týsdagin umrøddi løgtingið eina áheitan frá landsstýrismanninum, Bjarna Djurholm, um tíðarskáa í samband við ferðsluviðurskiftini í Leirvík, sum enn liggja púra óloyst.

Ein meiriluti í bygdarráðnum í Leirvík - fýra av sjey bygdarráðslimum - hevur samtykt, at vegur við tunli skal byggjast niðri við sjóvarmálan, og Teknistovan í Gøtu hevur gjørt eitt uppskot í hesum sambandi.

Hini trý í bygdarráðnum vilja helst, at ein nýggjur vegur verður bygdur omanfyri bygdina.

Sambært uppskotinum hjá meirilutanum byrjar tunnilin, sum verður einar 400 metrar langur, innanfyri kirkjuna og kemur útaftur við neystini úti í Buginum, og síðan skal vegur gerast í báðum endum.

Teknistovan hevur mett, at ein slík verkætlan fer at kosta einar 70-80 miljónir krónur, men Landsverk heldur, at henda sama ætlanin kostar onkustaðni millum 130 og 150 miljónir krónur.

Nú skal Teknistovan í Gøtu gera nýggjar kanningar og nýggja meting av hesi verkætlan, og hendan skal verða liðug 20. desember.

Tað er Vinnumálaráðið, sum hevur biðið leirvíkingar um eina prioritering, og tað er eisini Vinnumálaráðið, sum saman við Leirvíkar